# HEILSANIR



**Góði maður**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum í dag. Takk fyri alt.
**Kona tín**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum. Vit koma til Vágs at halda dagin saman við tær.
**Heilsan Rutt og Boas**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vóru við at gera hjúnabandsdag okkara 28.12.2002 ógloymandi.
**Jóhanna og Sjúrður Klakk**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum í dag. Takk fyri í summar. Hetta var ein fínur túrur. Ogur elska teg.Heilsan úr Vestmannaeygur
**Daniel Eli og Andre Stein**



**Man hetta vera Inga Beder?**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum í dag. Vónandi kemur tú skjótt til Havnar.
**Heilsan havnardreingirnir**
**PS:** Vit funnu myndina á netinum - vónandi er tað tú!



**Góða elskaða Elin**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum. Nú ert tú ordiliga stór. Jesus pápi verið hjá tær.
**Ynskja mamma og pabba**



**Góði Noel**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 12 ára degnum.
**Heilsan mamma, babba og Rógvi**



**Góði bróður**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum. Líka ungur og penur enn.
**Heilsan systkini**



**Góða elskaða Sólva**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum tann 28. Muss og klemm frá
**Mammu og babba**



**Góða Elin**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 30 apr. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja omma og abbin í Líðini**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum. Vit gleða okkum at halda dagin saman við tær.
**Heilsan Anna, Maria, Katrina og Tummas**



**Góði pabba**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum í dag. Eg vildi verið heima, men tað lá ikki fyri.
**Heilsan sonur tín sum fekk Ribberkol**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Skeið um barnaarbeiði verður í Hebron á Argjum 3. mai.
**Tilmelding á tlf. 315280**.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Stellu og Petur Zachariassen, Reynsgøta 57, Argir.
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti.
Mánakvøldið 5. mai kl. 20 Felagsbønarmøti í Filadelfia vegna Hvítusunnustevnuna. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

**Karisma**
Hvítusunnustevnan 2003 verður í døgunum 6.-9. juni í Ítróttarhøllini á Hálsi, har tiltøk verða fyri allar aldursbólkar. Nærri verður lýst seinni.

**Samkoman Lívdin**
Í Hoyvíkar skúla:
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómstiltak har Karl Johannesen talar um evnið: Pornografi.
Sunnumorgunin Familjumøti kl. 10.30 og Tilbiðjunarmøti kl. 12. Á báðum møtunum talar Poul Guttesen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. www.livdin.fo

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Trev Gregory.
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta kvinnur, kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Petur Skeel Nolsøe.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hósdag kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

**Youth with á Missión, Havn**
**Mikukvøldið 30.4.** kl. 19 hevur Landa Cope úr USA fyrilestur í hølunum hjá Meinigheitini í Hoyvík, Brekka 3, fyri leiðarum, lærarum og evangelistum.Evni: Komið ríki títt á jørð. Tilmelding á tlf. 517131.
**Fríggjadagin 2.5.** hevur Landa Cope, USA fyrilestur á Hotel Hafnia frá kl. 10-12 og kl. 14-18. Tilmelding á tlf. 517131.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Onki verður í KFUK vegna sjómanskvinnustevnuna í Nesvík.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Saron, Vestmanna**
Fríggjadagin kl. 20 Møti við Steve Dulwich og Jens Peder Pedersen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti í Filadelfia vegna Hvítusunnustevnuna.
Telefonandaktin 424741.

**Hósvík**
Møti verður í Hósvíkar kirkju 4. mai kl. 18. Luttøka verður av Meinigheitskórinum í Havn. 1/2 tíma áðrenn møti byrjar, verður bønarløta. Innsavning verður fyri heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Nerija á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti, kl. 22 Opið hús.
Leygardagin kl. 15 Seminar, kl. 20 Møti, kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti.

**Lívsins Orð**
Møti verður í kvøld kl. 20 við Jens Peder Pedersen.
Sunnudagin kl. 17 verður møti við Palla Højgaard.

**Keldan**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús. Team úr Mariager luttekur.
Sunnukvøldið kl. 17 Møti við Jóhan Petur Jóhannesen.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Innsavnan. Øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Barnaarbeiði (3) 4 til 6 ár, kl. 14 Barnaarbeiði, 1., 2. og 3. fl., kl. 16 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. fl.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Getsemane**
*Á Brekku 19, Klaksvík*
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Hugnakvøld, Heini Lützen syngur og vitnar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Poul Nikolai Steinberg.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Niels Edward Olsen.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 28. apríl*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl
**Túrurin mikudagin til Váganar, skal gjaldast áðrenn, 200 kr.**
*Týsdagin 29. apríl:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Hugleiðingar um at verða gamal. Jógvan Fríðriksson
*Mikudagin 30. apríl:*
Tilhaldið stongt í dag. **Túrur til Váganar. Úr Steintúni kl. 10. Vitja verður í Sandavágs kirkju, bygdasavnið í Miðvági, Kálvalíð, døgurði á Hotel Vágum kl. 12. Síðan verður vitja í Bø. Aftur í Havnini kl. 16. Kostnaður 200 kr. gjaldast áðrenn. Ferðaleiðari verður við á túrinum.**
*Hósdagin 1. mai*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát – Brandur Petersen
*Fríggjadagin 2. mai:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn**
Hóskvøldið 1. mai kl. 20 verður opið hús. Tað er 101 ára stovningardagur hjá Losjuni.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 3. mai kl. 15.00 giftast í Viðareiðis kirkju Helena Gudjónsson, Klaksvík og Signar Kallsberg, Viðareiði. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Norð.

Leygardagin 3. mai kl. 11.00 giftast í Elim í Søldarfirði Durita Sigurðsdóttir Rasmussen og Heini Eliasson Egholm. Opið hús verður í Ólavstovu í Saltangará millum kl. 13.00 og 19.00.

Leygardagin 17. mai kl. 10.00 giftast í Býráðshúsinum í Tórshavn, Lisbeth á Marknagil, Klaksvík og Jóannes Næs, Hvalba. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 13.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarligast siga frá á tlf. 456240, 265474, 375185, 221020 áðrenn 3. mai.

## KONFIRMATIÓN

4. mai konfirmerast Martin Larson Andersen úr Sandavági, sonur Maibritt Hansen og Lars Andersen, í Nørrelands kirke í Holsterbro. Adr. Dyssegården 47, 1. stv., 7500 Holsterbro.

Arngrím Witt Falkvard sonur Liljan Witt Falkenberg úr Miðvági, verður fermdur í Nørlem Kirke sunnudagin tann 4. mai Adr.: Nørrebjerg 37, DK-7620 Lemvig.

Sunnudagin 4. mai í Fuglebjerg kirke konfirmerast Jónas Johannesen, sonur Tórur og Birgitte Johannesen. Adr. Anne Marievej 1A, 4250 Fuglebjerg.

Sunnudagin 4. mai konfirmerast í Østerkornum kirke Kent Færch Christiansen, sonur Sandru Joensen, Leirvík og Gunnar Færch Christiansen, Guldbæk.

## 95 ÁR

Hósdagin 1. mai fyllir Súsanna Malena Poulsen, vanliga nevnd Sannelena á Lofti, á Eiði, 95 ár. Føðingardagurin verður hildin saman við børnunum.


**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Hósdagin 01.05. kl. $21^{45}$



Hósdagin 01.05. kl. $19^{30}$



Hósdagin 01.05. kl. $21^{00}$



Hósdagin 01.05. kl. $23^{00}$



Hósdagin 01.05. kl. $19^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**